Vika 25:
Leiðin til London
8 síður við spennandi tilfari um summar

# **London** by night

**LONDON**

## Girls night out

Hvat er betur enn ein vikuskiftistúrur til London við vinkonuni? Vit eru farnar til London hetta vikuskiftið við teirri vón at uppliva ymiskt, sum vit ikki hava møguleika til í okkara annars so deiliga landi. Vit vóna at uppliva ymiskt, bæði hvat viðvíkur mentan, søgu, shopping, býarlívi og ikki minst tey áhugaverdu og fjølbroyttu matstøðini, sum tann sera metropoliski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Møguleiki er fyri at lesa um okkara vikuskiftistúr í Sosialinum hvønn dag í vikuni, og vónandi er tað ein inspiration til aðrar føroyingar sum leingast eftir nýggjum og øðrum upplivingum

Væl vitandi um, at Londan hevur eitt ótal av tilboðum at bjóða teimum, ið dáma at fara ein túr býin, fóru vit glaðar frá hotellinum. Vit ætlaðu okkum sjálvsagt at royna tær ymisku pubburnar og barrirnar, ið eru so serstakar í Bretlandi við tí mentan, ið har er.

Fyrst vildu vit tó eta eitthvørt. Hetta kundi blíva ein trupulleiki, tí so nógv er í at velja, men vit gjørdust samdar um, at tað skuldi vera kinesiskt.

Vit fóru frá hotellinum Express by Holiday Inn, og eftir at hava gingið í umleið 10 minuttir komu vit til eina sera hugnaliga kinesiska matstovu.

Eftir ein frálíka góðan bita við millum annað ristaðum rækjum, spare ribs, dunnu rullaða inn í pannukøku, lekkurt kryddaðum kálvakjøti, nudlun….. og væl smakkandi sósum og góðum víni afturvið, gekk so leiðin víðari inn í býin.

Fyrsta staðið vit steðgaðu, var við Hyde Park. Yvir av Hyde Park liggur stásiliga 5 stjørnaða hotellið Metropolitan. Til hotellið hoyrir ein barr, sonevnda víðagitna Met Bar. Hetta er ein av teimum fínastu barrunum í London, og ein skal vera limur fyri at koma innar.

Av tí at barrin er so sera væl umtókt millum betra slagið í London, er tað ikki ein og hvør, ið sleppur at tekna seg sum lim. Ert tú limur í Met Bar, ert tú komin á tann mest umtókta limalistan í London.

Veit ikki rættuliga hvussu, men sum tíðindafólk hevði vinkonan onkursvegna fingið okkum á limalistan fyri hetta kvøldið. Vit fóru inn til móttøkuna og skrivaðu undur á eitt pappír, ið var í einari fínari mappu, áðrenn dyrnar til barrina vórðu lætnar upp…… Sigast má, at hetta var eitt sindur av einum skuffilsi.

Barrin var avbera fín, og tónleikurin var góður, men barrin var nógv minni enn vit høvdu væntað og hevði so at siga einki dansigólv. Eftir at hava verið í Met Bar eina løtu og høvdu hugt okkum væl um, fóru vit út aftur gjøgnum tær fínu dyrnar, har maður í hvítum handskum opnaði hurðina fyri okkum.

Eftir at vera hetta upplivilsið ríkari, vildu vit fegnar royna eitthvørt annað, og møguliga seinni eisini dansa. Vit skuldu ikki ganga langt, fyrr enn vit komu til tað staðið, ið hevði alt, ið ein kann ynskja sær av einum klubba. Vit vóru staddar í hjartanum á London, við Leicester Square, og staðið æt TigerTiger. Hetta var ein klubbi, ið hevði nógv at bjóða. Ein kundi bæði eta, drekka, dansa og lurta eftir tónleiki í TigerTiger. Klubbin var sera reinligur og hugnaligur og er Publican Awards Winner 2009.


London hevur sera nógv at bjóða kvøld og náttarlívinum



The Lion King er ein sera væl umtókur sjónleikur í løtuni

TigerTiger er ein keta, og er klubbin at finna í sjey ymiskum býum í Bretlandi t.d. í Newcastle, Leeds og Portsmouth.

Annars er náttarlívið í miðbýnum í London avbera friðarligt. Har var eingin harðskapur hvørki at hoyra ella síggja til. Eitt, ið vit eisini løgdu til merkis var, at hóast har vóru eins nógv fólk á gøtuni, sum á ólavsøku, so var býurin sera ruddiligur og reinur, eingi fløskubrot og annað, sum lá og rakst.

Tá ið vit høvdu dansað, prátað, etið og drukkið og føldu, at nú byrjaðu føturnar at troyttast, løgdu vit leiðina heim aftur til hotellið. Av tí, at vit vóru so troyttar í beinunum, avgjørdu vit, at vit vildu leiga ein hýruvogn, men hetta var lættari sagt enn gjørt. Tað vóru ikki nógvir hýruvognar at síggja, og teir, ið vóru á somu gøtu, sum vit vóru á, høvdu úr at gera.

Eftir eitt gott prát við fleiri bretar, lukkaðist tað okkum umsíðir at fáa ein hýruvogn, ið koyrdi okkum heim aftur á hotellið, har vit troyttar, men vælnøgdar fóru til songar.

Les meira um London by night á næstu síðu.

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við teldupostí
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo
Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo